# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Willy Kastborg 80 ár

Mikudagin 12 januar fyllir Willy Kastborg á Strondum 80 ár.

Willy er ættaður úr Norra. Seinnu árini hevur hann búð á Strondum saman við konu síni, Elsebeth Kristina.

Hann hevur gjøgnum árini skrivað nógvar greinar og gjørt samrøður fyri Sosialin og Dimmalætting og havt sendingar í Útvarpi Føroya.

Willy skrivaði handritið til føroysku operaina »Arnhild og Eystein«, og hann hevur skrivað páskaoratoriið »Judas Iskarjot«, sum í ár verður framført í Sjóvar Kirkju av kórinum »Tarita« undir leiðslu av Sunleifi Rasmussen.

Willy Kastborg hevur verið journalistur og blaðstjóri á fleiri norskum bløðum. Hann var høvuðsummælari fyri leikhús og bókmentir á »Arbejderbladet« í Oslo. Hansara greinar hava staðið í norskum, svenskum og donskum avísum.



Eisini var Willy við í arbeiðinum at gera eina lærubók fyri hægri skúlar í Norra.

Hann var programsekreterur í »Norsk Rikskringkasting« við radiosendingum í Norra, Danmark og øðrum evropeiskum londum.

Hann hevur leikstjórnað útvarpssjónleikum í Norra, og hansara uppseting av »Jeppe på bjerget« er sýnd á Nationalteatret í Oslo, og sýnd á palli í Svøríki, Finnlandi og Danmark.

80 ára føðingardagurin verður hildin í heiminum á Strondum.

## Gøtu kommuna nýggja heimsíðu

**Tíðindaskriv**

www.gota.fo er heimstaðurin hjá Gøtu kommunu á alnetinum. Ætlanin við heimasíðuni er at geva borgarunum í kommununi og øðrum áhugaðum, betri kunnleika um, hvat rørist í kommununi. Tað verið seg hvussu bygdaráðið og umsitingin er sansett, hvat bygdaráðið arbeiðir við o.s.fr..

Somuleiðis er ætlanin, at heimasíðan er staðið har lætt er at kunna seg um onnur kommununal viðurskifti, so sum hvar grundstykkir eru tøk, um alt frá barnaansing til eldrarøkt, vinnulív, o.a.m. Heimasíðan skal virka sum eitt hent amboð hjá øllum, sum hava áhuga fyri virkseminum í Gøtu kommunu.



Ætlanin er støðugt at menna og víðka um innihaldið á síðuni við nýggjum og viðkomandi tilfari.

Gøtu kommuna vónar, at heimasíðan kemur at verða til gagns hjá øllum borgarum og áhugaðum annars, og at hon kemur at fremja opinleika og økja kunnleikan til virksemið hjá kommununi.

Tað er Sansir, ið hevur sniðgivið og forritað heimasíðuna.

**Dagurin**

**12. januar. Reinaldur.** Týskur riddari, sum gjørdist munkur í Köln, men varð myrdur sv steinhøggarunum umleið ár 1200, tá ið hann koyrdi undir teir í arbeiðinum at byggja eina kirkju.
Týskt navn, sum merkir *tann, sum hevur vald á Gudum.*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum syndu samkenslu,
tá kæra mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Rigmor Restorff**
**Tórshavn**

andaðist og fór til gravar.

Takk fyri heilsanir, blómur og kransar, takk fyri peningagávur til musikskúlan og takk fyri vakra tónleikin í kirkjuni.

**Rasmus, Marianna og Durita**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at kæra móðir, omma og langomma okkara

**Magda Bjarnastein**
fødd 6.11.1913

andaðist á Vesturstovu 10. januar 2005, 91 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Synirnir**

**Prógv**

Linda Jensen, Toftir, hevur tann 9. januar lokið prógv sum Smásølustøðari. Hon hevur staðið í læru hjá Pidda, Toftir.

**Silvurbrúdleyp**

Í dag, 12. januar hava Johanna og Mannbjørn Olsen, Porkeri, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Porkeris skúla leygardagin 29. januar kl. 19.00. Tey, ið vilja halda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga okkum frá áðrenn 20. januar á tlf. 373864.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við